# Nullhugsjónin skal eisini galda fyri grannan

**– Vit skulu læra, at Nullhugsjónin skal verða galdandi fyri grannan eins væl og okkum og okkara egnu, sigur Jón Kragesteen frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sum heldur, at tað hevði onki galið verið í, at havt ferðforðingar um allan miðbýin í Havn**

FERÐSLUTRYGD
*Ingrid Bjarnastein*



*– Nullhugsjónin skal eisini verða galdandi fyri grannan. Vit hugsa um okkara familju, og hvør familja hevur eina nullhugsjón. Og tað er tað trupla. At fáa fólk at minnast til, at nullhugsjónin er galdandi fyri øll, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd*

Sosialurin varpaði fyri fáum døgum síðani ljós á ferðsluviðurskiftini omaneftir ovara parti á Tróndargøtu. Foreldrini, sum búgva í hesum grannalagnum, ynskja sær ferðforðingar oman eftir vegnum. Hetta kemst av, at bilar um sumrarnar, tá veðrið er gott, koyra við nógvari ferð omaneftir vegnum, og hetta meta foreldrini ikki vera trygt fyri børnini, tí tey spæla jú leingi úti tá tey hava frí.

– Ferðforðingar gera ógvuliga stóranmun, og í veruleikanum kanst tú ikki koyra meira enn 30 km/t har. Onki galið hevði verið í, at lagt ferðforðingar oman handanvegin, tí økið hevur bæði barnagarð, skúlar, nógv hús og nógv børn, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

## Ein um tíman

Ferðslukanningarnar, sum vórðu gjørdar eftir Tróndargøtu vístu, at tað vóru góðir 2200 bilar, sum koyrdu tann vegin um døgnið. Og um so bara eitt prosent av teimum koyrir ov skjótt, so verður hetta meira enn ein bilur um tíman, vísir Jón Kragesteen á.

– Hvør torir, at senda barnið út at spæla, tá tey vita, at meir a enn ein bilur um tíman koyrir uttan fyrilit? Brúgvasteinar eru lagdir til síðuvegirnar, og eg haldi, at teir skuldu heldur verið lagdir omaneftir sjálvari Tróndargøtu, sigur leiðarin fyri Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Jón Kragesteen heldur, at tað skuldi ikki verið loyvt at koyrt meira enn 30 km/t í meginpartinum av miðbýnum í Havn, tí tað ber ikki til at koyra skjótari hóast alt.

– Tað hevði heldur onki verið galið við, at gjørt bungur eftir øllum vegunum í miðbýnum. Tí fert tú í ein stórbý í einum av grannalondum okkara, so sært tú ferðforðingar í sjálvum miðbýnum.

Í svarinum, sum foreldrini fingu frá býráðnum stóð, at tað var ábyrgdin hjá tí einstaka bilføraranum at vísa fyrilit.

– Men hvør letur lívið á barninum í hendurnar á øðrum bilførarum, sum eiga at vísa fyrilit? Vit kunnu bara ásanna, at har er nógv arbeiði eftir at gera fyri at fáa kommunalpolitikararnar at skilja hesa støðuna. Um tú so setur ferðforðingar upp, so revsar tú ikki hini, sum koyra skynsamt, og tað er ikki rætt at siga, at tú revsar fólk, tá tú fært tey at koyra samvitskufult, sigur Jón Kragesteen.

## Nullhugsjón fyri øll

Fyri stuttum varð álitið »Ávegis til Nullhugsjónina« handað landsstýrismanninum. Nullhugsjónin leggur upp til, at ongin skal doyggja ella verða álvarsliga meiddur í ferðsluni.

– Vit skulu fáa Nullhugsjónina útum okkara fýra húsaveggir. Ein og hvør vil ikki, at nakað skal henda teirra familju, so hvør familja hevur eina Nullhugsjón. Tá hugsar man um seg sjálvan, men vit skulu fáa Nullhugsjónina at galda fyri grannan eisini.

– Sjúrður Olsen, formaður í teknisku nevnd í býráðnum segði, at foreldur vilja hava ferðforðingar tá børnini eru smá, og tá tey eru vaksin, vilja tey av við ferðforðingarnar. Hann rakar nakað sentralt her. Men tað er her tað trupla liggur. Nullhugsjónin skal verða galdandi fyri øll, greiðir Jón Kragesteen frá.

Leiðarin fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd vil ikki siga, at tað skulu fólk doyggja áðrenn nakað hendir.

– Men tað sær út sum, at avleiðingarnar skulu vera nógvar áðrenn fólkini fáa eyguni upp fyri, at okkurt má gerast, sigur Jón Kragesteen, sum vísir á at bungurnar á Gundadalsvegnum vóru gjørdar eftir, at eini trý fólk høvdu latið lív og tað sama við SMS-vegnum.

– Vit eru ikki komin longur enn so, at vegirnir verða gjørdir til bilførarar. Um tú hyggur eftir gongubreytakantunum, so verða niðurskurðir gjørdir, har eitt bilhús er. Men á endanum á gongubreytunum, har fólk skulu ganga, bæði við barnavognum og koyra við koyristóli, har er kanturin eini 10-15 cm høgur.

– Ein hugburðsbroyting skal til. Tankarnir skulu broytast. Men tað er ofta soleiðis, at teir politikararnir, sum úttala seg um ferðsluviðurskift eru menn um miðjan aldur, har børnini eru flogin úr reiðrinum. Eg haldi, at konufólk skilja handan trupulleikan betri, men vit hava nógv eftir at gera fyri at fáa fólk at skilja hesi tingini, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd at enda.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæra kona, mamma, vermamma, omma og dóttir

**Sigbjørg Dahl,**
Oyri

Andaðist hósdagin 29. mai, 53 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Norðskála kirkju sunnudagin 1. juni kl. 14.00

Familjunnar vegna
**Hjallgrím og børnini við familjum**

Tey, ið vilja minnast Sigbjørg, kunnu lata Norðskála kirkju eina gávu á konto í peningastovnunum

RAGNAR MAGNUSSEN
Timbur- & snikkaraarbeiði
t.d.
Umvælingar
Skifting av tøkum
Húsavørðsarbeiði
tel. 51 89 02

An international study programme at the Academy of Higher Education is only a click away!
• Chemical and Biotechnical Analyst
• Building Technician
• Multimedia Designer
Look it up at www.ats.dk for further information
Academy of Higher Education
Aarhus Technical College
Denmark

# Franska umboðið í Føroyum

**Mikudagin varð Julianna Klett tilnevnd franskur konsul í Føroyum**

KONSUL
*Heri á Rógvi*



*Julianna Klett saman við Régis de Belenet, fronskum sendiharra í Danmark.*
*Mynd: Heri á Rógvi*

–Eg veit ikki rættiliga, hví eg eri vald, men tað er ein stórur heiður, sum eg gleði meg til at fara í holt við.

Soleiðis sigur Julianna Klett, nýútnevndur franskur heiðurskonsul. Tað var mikudagin, at hon alment varð tilnevd konsul Fraklands í Føroyum.

Tað var Régis de Belenet, franskur sendiharri í Danmark, sum var komin til landi í hesum ørindum.

Ì sambandi við tilnevningina ferðaðist franski sendiharrin eisini kring landið og vitjaði fleiri stovnar og fyritøkur.

Julianna Klett tekur við eftir Valdemar Lützen sum franskur konsul. Umframt at vera advokat er Julianna eisini útbúgvin trý málsligur korrespondentur í fronskum, týskum og enskum og hevur lisið í Sorbon universitetinum í París.

## Hjálpa fraklendingum

Fremsta uppgávan hjá einum konsli er at hjálpa fronskum ríkisborgarum í Føroyum. Julianna dugir ikki at siga okkum, hvussu nógvir fraklendingar búgva í Føroyum, men tað eru nakrir.

– Men arbeiðið sum konsul er eisini at vera millumlið millum føroyskar og franskar myndugleikar. Frakland hevur áhuga fyri, hvat hendir í Føroyum og ynskir at kunna seg um, hvat hendir, sigur Julianna Klett.

Arbeiðið sum konsul er ólønt.

I komandi útgávunum verður meira at lesa um tilnevngina av nýggjum fronskum konsuli.

Sosialurin ynskir Julionnu til lukku við heiðurinum.

www.smyril-line.com
TØKK

Í SAMBANDI VIÐ MÓTTØKUNA AV NÝGGJU NORRØNU, VILJA VIT FEGINTAKKA TYKKUM ØLLUM, VIRKJUM, STOVNUM, FELØGUM OG EINSTAKLINGUM, SUM VIÐ GÁVUM, BLÓMUM O.Ø. FRØDDUST SAMAN VIÐ OKKUM HENDAN SØGULIGA DAG.
SMYRIL LINE
J. Broncksgøta 37 · FO-100 Tórshavn · Tlf: 34 59 00 · office@smyril-line.fo

www.smyril-line.com

SØKT VERÐUR EFTIR TVEIMUM FÓLKUM TIL FARMADEILDINA

Søkt verður eftir einum skrivstovufólki til Avgreiðsluna og einum til Skaðadeildina, ið er deild undir Farmadeildini. Størvini verða at seta skjótast gjørligt.

Starvið í Avgreiðsluni umfatar:
• Avgreiðslu av inngangandi farmi
• Kundaavgreiðslu
• Vanligt skrivstovuarbeiði

Starvið á Skaðadeildini umfatar:
• Avgreiðslu av skaðasakum
• Kundaavgreiðslu
• Vanligt skrivstovuarbeiði

Førleikakrav:
Til bæði størvini krevst at umsøkjarin hevur royndir innan skrivstovuarbeiði. Tað er hartil ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur skrivstovuútbúgving.

Neyðugt er, at viðkomandi er vanur at arbeiða við teldu.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt.

Setanarviðurskifti:
Størvini eru í høvuðsheitum fulltíðarstørv. Í sambandi við starvið á Skaðadeildini er tó møguleiki fyri niðursettari tíð.

Løn sambært avtalu.

Umsóknir:
Umsóknir við møguligum prógvum skulu sendast til:

*Smyril Line*
*Postsmoga 370*
*FO-110 Tórshavn*

ella við teldupost til:

*jonfinns@smyril-line.fo*

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2003.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Jónfinn Simonsen á tlf. 34 59 60 ella 21 76 71.

SMYRIL LINE
J. Broncksgøta 37 · Postbox 370 · FO-110 Tórshavn · Tlf. +298 34 59 00
Fax: +298 34 59 50 · Teldupostur: office@smyril-line.fo

Hava tygum tørv á einum bili í nakrar tímar, dagar ella longur, er skilagott at leiga, heldur enn eiga!
Setið tygum í samband við okkum,
- tað loysir seg!!
AVIS BILÚTLEIGAN
Staravegur 1, Tórshavn, tlf. 217 535 / 313 535
Flogvøllurin: tlf. 212 765 /358 800
Teldupostur: avis@post.olivant.fo

P/f Jógvan Weihe Heil- og smásøla


Staravegur 15 · Tel. 31 38 97 · Fartel. 21 38 97 · Fax 31 38 83
Teldupostur: jwimport@post.olivant.fo · heimasíða: www.jogvan-weihe.fo